# Býráðið

**Dagfesting:** 25.05.2023 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Ólavur Larsen

Varalimir: Kristian Martin Petersen fyri Magni Jøkladal

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 15/23 | 23/00246-3 | Innkalling av Kristian Martin Petersen, sum varaumboð fyri Magna Jøkladal |
| 16/23 | 23/00075-26 | Byggiloyvi á matr. nr. 871dt á Kambsdali |
| 17/23 | 23/00259-1 | Byggisamtykt - Íbúðarbygging í Øki B |
| 18/23 | 23/00258-1 | Fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar Bókasavn 2024 |
| 19/23 | 23/00293-1 | Eykajáttan mai 2023 |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

## 15/23
## 23/00246-3 Innkalling av Kristian Martin Petersen, sum varaumboð fyri Magna Jøkladal

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.05.2023 | 15/23 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Magni Jøkladal, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 25. mai 2023 kl. 19:00. Eftir ynski frá Magna Jøkladal er Kristian Martin Petersen kallaður inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Kristian Martin Petersen er fjórðvaldi limurin á lista B við 46 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 25. mai gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Kristian Martin Petersen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Magni Jøkladal, býráðslimur hevur forfall til býráðsfundin 25. mai 2023 kl. 19:00. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri, mælir til, at Kristian Martin Petersen kann taka sætið í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 25. mai 2023 kl. 19:00. | | |
| Dagf | 23. mai 2023 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Býráðið 25. mai 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við at Kristian Martin Petersen tekur sæti fyri Magna Jøkladal á fundinum 25. mai 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 16/23
## 23/00075-26 Byggiloyvi á matr. nr. 871dt á Kambsdali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 09.05.2023 | 10/23 |
| 2 Býráðið | 25.05.2023 | 16/23 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd, býráðið | | |
| Stutt lýsing av málinum | Fyritøkan Klima Energi Service P/F(KES) hevur sent tekningar um loyvið at byggja eina høll á Kambsdali á matr. nr. 871dt.<br><br>Fyrsta umsóknin um byggiloyvi bleiv send 02.02.2023, tó so fær umsøkjari at vita at eigaraviðurskiftini mugu vera komin uppá pláss áðrenn kommunan kann viðgera eina byggimálsumsókn.<br><br>Tann 04. Mai 2023 verður byggiloyvið útskrivað. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Orsøkin er at øll byggimál av handils og vinnubygningum skulu í Vinnu- og Havnanevndina og Býráðið til viðgerðar og góðkenningar. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 23_00075_25_Byggiloyvi til lagurhøll á matr. nr. 871dt, í Fuglafirði<br>Samskifti millum Fuglafjarðar kommunu og Klima Energi Service J.nr. 23_00075_1, 23_00075_25, 23_00075_13. 23_00075_11, 23_00075_8 og 23_00075_1. | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at geva byggiloyvið við teimum treytum sum eru settar.<br><br>**Tilmæli til Býráðið 25. mai 2023** | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Mælt verður býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum og Vinnu- og Havnanevndini um at geva fyritøkuni KES byggiloyvi á matr. nr. 871dt, sambært teimum treytum settar eru. |
| Dagf | 06.05.2023 |

**Vinnu- og havnanevndin 09. mai 2023:**
Vinnu- og umhvørvisnevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 25. maj 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá Vinnu- og Havnanevndini um at geva KES byggiloyvi til vinnubygning á matr. nr. 871dt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

# 17/23
# 23/00259-1 Byggisamtykt - Íbúðarbygging í Øki B

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.05.2023 | 27/23 |
| 2 Býráðið | 25.05.2023 | 17/23 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Nýggji eigarin av gamla býráðshúsinum hevur ætlanir um at inrætta bygningin til íbúðir. Hetta er loyvt eftirsum bygningurin upprunaliga var bygdur við íbúðum á tveimum ovastu á hæddunum. Samtykt var á fundi 17. februar 2022 at taka málið upp aftur tá bygningurin var seldur. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Eigarin av matr nr. 326 og matr. nr. 204a hevur ætlanir um at byggja íbúðir í bygninginum á matr. nr. 326 og at hava parkering á matr. nr. 204a. Ikki er neyðugt at leggja hesar matriklar saman. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Byggisamtykt og BK17<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Mál 22/00148 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at gerða broyting í generellu byggisamtyktini sum loyvir íbúðarbygging í øllum økinum B eftir nærri ásettum reglum. Hetta viðførir at tað ikki verður neyðugt at gerða broytingar hvørja ferð ynski er um at byggja íbúðir. So sleppa vit eisini undan mongu serstøku byggisamtyktunum.<br><br>**Tilmæli til býráðsfundin 25. mai 2023.**<br>Kommunustjórin mælir býráðnum til at taka undir við fylgja tilmælinum frá tekniska leiðaranum og teknisku nevnd. Mælt verður til og at heita á umsitingina um at koma við uppskoti til nýggja orðing í byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu, sum tekur hædd fyri hesari broyting. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 3. mai 2023 |
|---|---|

**Tekniska nevnd 09. mai 2023:**
Tekniska nevnd fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 25. maj 2023:**
Býráðið tekur einmælt undir við at heita á umsitingina um at koma við uppskoti til broytta orðing í byggisamtyktini, sum tekur hædd fyri at tað ikki skulu gerast serstakar byggisamtyktir hvørja ferð umsóknir um íbúðarbygging koma fyri.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 18/23
## 23/00258-1 Fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar Bókasavn 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2023 | 22/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.05.2023 | 25/23 |
| 3 Býráðið | 25.05.2023 | 18/23 |



## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Mentamálanevndini | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Árið 2022, var eitt hendingaríkt á Fuglafjarðar bókasavni.<br>Bókasavnið er fyri øll, og tað verður skipað fyri tiltøkum, sum skapa áhuga fyri vitan, bókmentum, mentan og list.<br>Skipað hevur verið fyri upplestri, bæði til børn og vaksin, umframt at rithøvundar hava verið og lisið upp, eisini lesiringakvøld hava verið regluliga.<br>Hartil hevur verið skipað fyri reglulugum filmskvøldum. Filmskvøld til eldri borgarar við svørt/hvítum filmum, Summarsýningar í feriutíð til yngri borgarar, umframt evniskvøld við Oscar vinnandi filmum.<br>Table top Føroyar hava verið inni á BS við tiltaki og mikudagur er borðspældagur.<br>Regluligir online fyrilestrar hava somuleiðis verið eitt afturvendandi tiltak.<br>Bókasavnið verður væl vitjað. Barnagarðar, ungdómar, familjur við børnum. Serbreytin á Kambsdali og Rásin vitja javnan, umframt at brúkarar frá Doktarahúsinum vitja. Umframt Riddarnir.<br>Hóast vaksandi aktivitet, eigur størri áherðsla at leggjast á tiltøk sum skapa áhuga og ans fyri máli, bókmentum og vitan.<br>Lagda fíggjarætlan tekur hædd fyri at styrkja um økið.<br><br>Í viðfestu fíggjarætlan, verður roknað við reellu afturberingini frá landinum, sum í verandi løtu er 15,5% | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Árliga fíggjarætlanin skal latast inn til Landsbókasavnið | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | NEI | NEI |
| | Umsitingarligar | NEI | NEI |
| Tilmæli | Mælt verður til at taka undir við fíggjarætlanini fyri 2024.<br><br>**Tilmæli til Fíggjarnevndina 23. mai 2023**<br>Fíggjarnevndin skal taka støðu til um hon tekur undir við fíggjarætlanini fyri Bókasavnið 2024 og vil viðmæla Býráðnum, at gera tað sama. | | |
| Dagf | 03.05.2023 | | |

**Mentamálanevndin 03. maj 2023:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at býráðið somuleiðis ger tað.

**Fíggjarnevndin 23. maj 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við fíggjarætlanini ár 2024 fyri Fuglafjarðar Bóksavn og mælir Býráðnum til at samtykkja hesa.



**Býráðið 25. maj 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum til fíggjarætlan ár 2024.

**19/23**
**23/00293-1 Eykajáttan mai 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.05.2023 | 24/23 |
| 2 Býráðið | 25.05.2023 | 19/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Leypandi roknskapareftirlitið, dagførdir prísir og óvæntað meirarbeiðið vísa longu nú í mai 2023 at tørvur er á eykajáttan og umraðfesting á avísum økjum.<br><br>Ynskini um eykajáttan mai 2023 eru hesar:<br><br><u>Øki 2: Almanna og heilsumál:</u><br>Rakstrarstað 264 Doktarahúsini hevur tørv á 125 tkr. tí arbeiði við brotnari kloakk og ótøttum oljutanga hevur gjørt viðlíkahaldsarbeiði dýrari en væntað.<br><br>Rakstrarstað 280 Serflutningsskipan hevur tørv á 100 tkr. fyri at halda núverandi skipan koyrandi.<br><br><u>Øki 5: Mentan og Frítíð:</u><br>Rakstrarstað 532 Kunning um kommununa hevur tørv á 300 tkr., til bókaútgávuna av bind I og II av Fuglafjarðar kommununi, sum miðað verður ímóti kemur út í heyst. Orsøkin til meirkostnaðin er serliga at generelli prísvøksturin hevur gjørt prentingina dýrari enn upprunaliga mett.<br><br><u>Øki 6: Teknisk mál:</u><br>Rakstrarstað 614 matr. nr.614 rakstur av FK bygningi hevur tørv á 100 tkr., til hølini har gartnaradeildin og húsavarðarnir halda til. Hetta var av misgáum ikki komið við í fíggjarætlanina upprunalig. Peningur til hetta endamál verður tikin frá Rakstrarstað 616 Arbeiðsbygningar og er hendan meirjáttan tí útreiðsluneutral.<br><br>Rakstrarstað 615 matr. nr. 437 (FK-íløgur). Her er ynski frá sosiali nevnd um at fáa bygningin málaðan í ár. Tekniska deild hevur fingið eitt tilboð uppá hetta til 170 tkr. Peningur er ikki settur av til hetta endamál í 2023. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Rakstrarstað 637 Kirkjugarðar(íløgur) hevur tørv á 250 tkr., tí lægsta tilboð uppá víðkanina av kirkjugarðinum aftaná samráðing, varð 250 tkr. hægri enn upprunaliga avsett.<br><br>Rakstrarstað 672 Reinhald og kavarudding hevur tørv á 400 tkr., tí lutfalsliga nógvi kavin fyrst í árinum hevur viðført meirnýtslu á hesum rakstrarstaðnum.<br><br><u>Øki 7: Kommunal virki:</u><br>Rakstrarstað 750 Fuglafjarðar havn hevur tørv á 250 tkr., sum er løn til fjórða havnaumsjónarmannin, sum lýst er eftir, tað í eftir er av árinum. Við nógva økta virkseminum á havnaøkinum er tørvur á einum havnaumsjónaðarmanni afturat fyri at fáa vaktarætlanina at hanga saman, at fáa feriu avviklaða, hava tøka orku í samband við sjúku og annað virksemi. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunu stýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum.<br><br>Málið um eykajáttan hevur verið umrøtt hjá Teknisku nevnd, Vinnu og Havnanevndini, Sosialu nevnd, Mentamálanevndini og Orku- og Umhværvisnevndini í mai 2023. Nevndirnar hava gjøgnumgingið rakstrarstøðini tær vara av og eru komin við umbøn um umraðfestingar, sum fyrst fíggjarnevndin skal ummælta áðrenn býráðið viðger tær. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Eykajáttan várið 2023.doc<br>Tilbod - prent av Fuglafjardar søgu 2020 og 2023.pdf | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Eykajáttanarumbønin omanfyri er tilsamans 1.695 tkr. og funnar eru 100 tkr., sum kunnu umraðfestast at fíggja meirjáttanina. Mælt verður til at fíggjarnevndin viðger umbønina og mælir býraðnum til at hække | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | rakstrarkarmin við 1.595 tkr, alternativt, at gera umraðfestingar í mun til verandi fíggjarætlan. |
| Dagf | 21. mai 2023 |

**Fíggjarnevndin 23. maj 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við við eykajáttanini og mælir til at hækka rakstrarkarmin við 1.175 tkr. og løgukarmin við 420 tkr. Meirjáttanin verður fíggjað av innistandandi.

**Býráðið 25. maj 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini fyri mai 2023 og fer hon við hesum til aðru viðgerð.

Fundurin lokin kl. 20.30

______________________________

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Ólavur Larsen

Kristian Martin Petersen